gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Endurskoðan

## *Oddagrein*

Einaferð ljóðaði, at Finn Norman Christensen-bygnaðurin skuldi endurskoðast, tí ein ávís ásannan av stirvni var at hóma í politiska umhvørvinum. Vit hava einki sæð til hesa endurskoðan enn, men skulu vera teir fyrstu til at heilsa henni vælkomnari, tá hon einaferð kemur.

Tað er altíð gott at endurskoða bygnað og mannagongdir við millumbili fyri at stremba ímóti so góðari tænastu fyri borgaran sum møguligt. Føroyska miðfyrisitingin í núverandi líki hevur ikki nógv ár á baki, og ikki kann sigast, at alt hevur hepnast líka væl, ið hon hevur fingist við. Vit hava mangan nevnt landsverkfrøðingsmálið og síggja nú, at onnur stýri, kanska vegna ivasamari politiskari leiðslu, hava trupulleikar at umsita síni málsøki. Her kunnu vit til dømis nevna Almanna- og Heilsumálastýrið undir leiðslu av Helenu Dam á Neystabø.

Sum sagt kann trupulleikin liggja í ivasamari politiskari leiðslu, men Føroya land má hava ein bygnað í miðfyristingini við einum effektivum embætisverki, ið tolir ivasama politiska leiðslu uttan stórvegis trupulleikar. Hetta er tíverri ikki støðan í dag. Kanska er partur av trupulleikanum, at røttu profilarnir ikki sita í røttum størvum. Til dømis kann man seta spurnartekin við, hvussu skilagott tað er, um tað veruliga hendir í ár 2000, at fólk við so at siga ongum akademiskum ancienniteti kunnu sita sum deildarstjórar og enntá kanska hava hildið formanssessir í almennum nevndum.

Var støðan, at tað var ein stórur mangul uppá fólk við góðum pappírum, so var støðan eitt sindur meira skillig, men tað kann eftir øllum at døma ikki verða støðan, tá menn við góðum pappírum og nógvum ára royndum verða koyrdir til hús, sum eitt nú undanfarni landsverkfrøðingur. Vit mugu í hvussu so er hava somikið stórt álit á nýggja bygnaðinum og leiðsluni av honum, at tað ikki hevur verið studentararbeiði at koyrt almennar stovnsleiðarar til hús. Slíkt høvdu ábyrgdarfullir landsstýrismenn og aðalstjórar ivaleyst aldrin kunnað góðtikið, tí sjálvsagt hevði slíkt verið kannað fyrr ella seinni.

Politiska leiðslan og leiðslan í umsitingi tryggjar ivaleyst í dag, at eitt nú frágreiðingar latnar løgtinginum og síðani útgivnar, verða skrivaðar av fólki við pappírunum í ordan, og at slíkar rapportir ella analysir verða eftirhugdar av fólki við drúgvum royndum og góðum yvirliti yvir, hvat hevur verið gjørt á økinum tey seinastu nógvu árini. Helst er tað so, at eitt stýri sum — fyri bert at nevna eitt dømi - Vinnumálastýrið, tryggjar, at tað ikki kemur inflatión í starvsheiti og frágreiðingar, tí fólk uttan pappír ella júst útklakt fólk uttan stórvegis innlit í søgu og mannagongdir, einsamøll sleppa at yvirtaka málsøki og ábyrgdarøki, uttan at fakliga fundamentið er stívað ordiliga av. Seinasti bakstopparin, ið óivað tryggjar støðið í umsitingini, má verða Búskapar- og Løgfrøðingafelagið, ið ivaleyst við íðni verjir um sítt fakøki soleiðis, at formelt arbeiði krevur formell pappír.

Hóast omanfyristandandi, so er ivaleyst gott við einari uttanveltaðari endurskoðan av bygnaðinum, tí tað kann vera, at støðan ikki heilt er, sum vit tulka hana.

***Sosialurin***

# Viðmerking:

## Til Paul – fra menigheden

Nej, nej – Paul. Det her går slet ikke. Dette er ikke hvad vi har ventet på i 14 år. Vi havde krisemøde i menigheden i går, og der var bred enighed om ydmygt at opfordre dig til at intensivere kampen.

Ligge og zik-zakke lidt rundt om 3 sømilegrænsen og nogle få billeder, hvor du hyggesnakker med presse og politi! Nej, Paul – vi siger det rent ud – det er for **skvattet.**

**Blod**, Paul, – **blod**, det er det vi venter på. Tror du virkelig de mange pressefolk har udstået strabadser i dagevis, bare for at filme dig i din fine admiralsuniform, medens du kaster dine mannakorn ud for den beundrende verden. Eller tænk på alle de små amerikanske skolebørn! Deres medfødte voldelige tilbøjeligheder må hele tiden stimuleres – ellers ender det med, at de glemmer at lade revolveren med skarpt i frikvarteret.

Nej, Paul-blod, det skylder du os alle. Og nu ikke noget med det sædvanlige Hollywoodpjat med ketchup og rød frugtsaft. Ingen manipulation denne gang. **We want the real thing!**

Så, kære Paul, sagen mangler en rigtig martyr, så vi i menigheden vi hermed opfordre dig til at dø for sagen.

Desværre bliver du nødt til at begå selvmord. Her i landet har vi ikke den gode amerikanske tradition med at skyde folk vi er uenige med. Vores blodtørst indskrænker sig til at dræbe den føde, vi spiser. Men vi er jo også kun amatører.

Og så et hjertesuk: Kunne I ikke slukke motoren på Ocean Warrior? En babyhval havde forvildet sig ind i Tórshavn havn. Den havde mistet sonarkontakten med sin moder ude ved 3-milegrænsen p.g.a. for megen motorlarm. En meget traumatisk oplevelse for det lille potentielle geni. Men, med så mange mand ombord skulle det ikke være umuligt at skyde en rimelig fart, hvis alle smider en åre ud og tager et par raske tag.

Dine mange trofæer på skibsiden som markerer dine heltmodige sejre som international terrorist, sorry!, hvalaktivist, er meget smukke. Men, det færøske flag mangler! Er vi ikke gode nok? Kunne du ikke findet et eller andet færøsk skib, der havde – om ikke andet – så set en hval og så sænke det?

Vi ville være glade for at se vores flag mellem de andre blodtørstige nationer.

Hilsen din ven,

**Hans Jensen, Hvalvík**

P.S.: Hvor køber du de fine admiralsuniformer. Jeg har godt nok en båd, men en flot admiralsuniform ville nok imponere kvinderne mere, så hvis det ikke er til megen ulejlighed, og det ikke forstyrrer din retfærdige kamp for meget, så send mig venligst adressen.

## Á ferðaleiðaraskúla í Danmark

Um talið á danum á Service & Co. ferðaleiðaraskúlunum í Spanien skuldu svarað til talið á føroyingum, sum luttaka, so skuldi talið á dønum verið 10 faldað.

Service & Co. er størsti ferðaleiðaraskúli í Danmark, og í samstarvið við Toru Tourist Traffic í Tórshavn bjóða tey eitt intensivt skeið, sum varar í 1 mánaða — í Norður Spanien, einans 55 km frá Barcelona. Og nógvir føroyingar hava longu roynt seg mót teim mongu avbjóðingunum, sum ein kemur út fyri á skeiðnum.

Skeiðið er um ferðavinnu, tænastu og sølu. Fleiri enn 20 lærarar royna teirra besta fyri at øll tey umleið 90 ungfólkini fáa eina góða barlast innan tænastu — og ferðavinnuheimin, aftaná lokið skeið.

Skúlin tryggjar øllum teimum, sum hava lokið skeiðið, eitt starv í útheiminum, tó mest sum ferðaleiðari. Tey sum ikki vilja aftur til Føroya beinanvegin, kunnu læra um ferðavinnuna í útheiminum, beinleiðis aftaná lokið skeið. Tey flestu velja at søkja um starv sum ferðaleiðari. Møguliga er tað **tann** avbjóðingin sum dregur, tá so nógvir ungir føroyingar royna seg sunnanfyri.

– Føroyingar eru sikkur kort fyri tey stóru feløgini innan ferðavinnuna. Tey kenna tey skandinavisku málini, kunnu tosa og skilja allar danar, norðmenn og sviar. Tað hava stóru nøvnini so sum, Ving, Star Tour og Apollo, stóran áhuga í« sigur Palle Højsholt, sum er stjóri á Service & Co.

Hann heldur fram

– Og eg haldi ikki, at føroyingar fara at steðga á nú. Á skúlanum hava vit sæð føroyingar, sum hava verið ígjøgnum útbúgvingina, fingið nógv burturúr, bæði á tí persónliga, tænastuliga og menniskjaliga økinum, sigur Tora Tourist Trafficí tíðindaskrivi.

## Barsskor verður umvældur

Strandfaraskipið Barsskor, sum fekk maskinskaða undir siglingin seinasta fríggjadag, fer helst aftur í sigling í morgin.

Barsskor liggur nú á bedingini í Klaksvík, har hann verður umvældur. Eitt stempul er farið, og hjá Strandferðsluni í Klaksvík roknaðu tey í gjár við, at Barsskor fór at sigla aftur síðst í vikuni.

Meðan Barsskor verður umvældur, røkir Alpha Pilot siglingina millum Klaksvík og Kalsoynna. Alpha Pilot tekur ikki eins nógv fólk og Barsskor, men hann siglir nakað skjótari.

Barsskor, sum er bygdur í 1929, tekur 50 ferðafólk, meðan Alpha Pilot tekur 25.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**



## Magnus á Dalbø
### – til æru og minnis

Pápi

Tú lærdi meg at síggja,
at eingin munur er á træli og kongi.

Tú lærdi meg at virða,
teg, mammu, heimið og meg sjálvan.

Hví gráti eg bara tá ið eingin sær?

við Miðportur ein sunnudag,

**sonur tín**






**Okkara vitan er tín trygd**
**- tá íløgan skal gerast**

Føroya Banki hevur nú møguleika at bjóða tær at taka lut í keyp og sølu á altjóða virðisbrævamarknaðunum.

Føroya Banki hevur tikið upp samstarv við íløgufelagið Bank-Invest, ið er millum elstu og størstu fyritøkur av sínum slag í Danmark.

Eitt íløgufelag, ið er eitt felag, har fleiri íløgufólk ganga saman, er ein góð loysn hjá fólki, ið hava eitt ávíst avlopsgjaldføri og ynskja virkna røkt av íløgunum, men hava ikki tíð og orku ella innlit í virðisbrævahandil.

Í Føroya Banka er tín íløga í hondum hjá fólki við sakkunnleika innan virðisbrævahandil. Tí er okkara vitan tín trygd, tá íløgan skal gerast.

Er hetta nakað fyri teg, er tú vælkomin at seta teg í samband við fíggjardeild bankans.

FØROYA BANKI
Húsagøta 3 • Postboks 3048 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 13 50 • Fax 31 58 50
e-mail: fbk@post.olivant.fo • www.foryabanki.fo